## Fyrireika eitt serstakt tunnilskór



*Norðoyatunnilin letur upp 29. apríl við sangi og einum hópi av øðrum tiltøkum*

**Klaksvík:** Dagur er nú ásettur, nær Norðoyatunnilin fer at lata upp. Henda søguliga leygardagin 29. apríl er ætlanin at skipa fyri alskyns tiltøkum. Nú hevur so P/F Norðoyatunnilin sett Steintór Rasmussen sum samskipara av tiltøkunum sum skulu verða henda dagin.

Tiltøkini verða eisini samskipað á samráð við mentamáladeildina hjá Klaksvíkar býráð, sum eisini er ein vertur til henda stóra dag.

Ætlanin er at fyrireika og samskipa eina stóra skrá, sum greiður frá øllum tiltøkum, har fyritøkur og stovnar kunnu gera seg sjónligar henda dagin, sum eftir ætlan skal gerast bæði hugnaligur og serligur.

Arbeitt verður eisini við einum stórum „Tunnilskóri", sum verður sett saman av vandum sangarum úr Eysturoynni og Norðoyggjum til hetta serstaka høvið.

**sb.**

## Stuðul til koyring til venjing

**Vestmanna:** Nógvir dreingir í Vestmanna hava hug til annað enn bert til hondbóltin, hóast tað er henda, sum bygdin man vera mest kend fyri.

Fleiri teirra hava tí sæð seg noyddar at fara til fótbóltsvenjing í Sandavági. Og í hesum sambandi søkti ítróttarfelagið í Sandavági – SÍF – Vestmanna kommunu um stuðul til flutning av hesum dreingjum til fótbóltsvenjingina.

Á seinasta fundi í bygdarráðnum varð samtykt at stuðla hesum flutningi við 10.000 krónum.

**sb.**

## Enn eitt sangskeið fyri suðringum

**Vágur:** "KirkjukóriðLjómur" skipa aftur í komandi viku fyri sangskeiði. Fyrru ferð var í januar í ár, hesa ferð verður tað í komandi viku.

Tað er Súsanna Brattaberg sum aftur hesaferð gevur frálæru eftir serstøkum máta, sum er brúktur í Italiu.

Um skeiðið sigur Súsanna soleiðis við Suðurrás:

– Við einføldum venjingum, kunnu vit fáa røddina størri, lægri, hægri og breiðari – alt tað, ið ein droymir um, tá ið ein hoyrir góðan sang. Tað er at líkna saman við ítrótt, tí við venjing kunnu vit betra røddina sera nógv.

- Grundarlagið er stuttleikin at syngja, og at tit duga eitt sindur av nótum, sigur Súsanna.

Fyrra skeiðið varð fullteknað beinanvegin við luttakarum í øllum aldrum og úr allari oynni.

Sangskeiðið verður í Vágs kirkju og byrjar komandi mánadag og heldur fram til hósdagin. Pláss er fyri 15 næmingum.

**sb.**



*Vágs kirkja verður enn einaferð karmur um eitt skeið fyri sangglaðar suðringar*

# Smyril skapt vaksandi áhuga fyri Suðuroynni

**Nógv fólk ynskja at gera brúk av nýggja Smyrli. Hetta merkist týðiliga aftur í fyrispurningum hjá Suðuroyar Kunningarstovu um tað, sum oyggin hevur at bjóða teimum ferðandi. – Vit bíða tí spent eftir, hvussu hetta árið fer at verða, sigur Póla Strøm, leiðari á kunningarstovuni**



*Suðuroyingar fegnast um nýggja Smyril, og tað smittar eisini av á áhugan fyri ferðing og gisting hjá fólki norðanfjørðs*

Mynd: Jens Kr. Vang

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Suðuroy:** – Jú, tað er so púra vist, at vit hava fingið nógv fleiri fyrispurningar um bæði gisting og ferðing, síðani Smyril kom.

Póla Strøm er leiðari á Suðuroyar Kunningarstovu á Tvøroyri. Og hon er ikki í iva um týdningin, sum hetta flaggskip okkara hevur havt fyri oynna og serliga ferðavinnuna í oynni.

Bæði talið av ferðafólkum og bilum er økt munandi, síðani nýggi Smyril varð settur í sigling í november mánaði í fjør.

Og tað er einki sum bendir á, at hetta talið fer at minka nakað, nú tað stundar móti sumri.

– Nógv fólk vitja vanliga her um høgtíðirnar páskir og hvítusunnu. Men eisini til aðrar tíðir ynskja fólk at koma higar.

– Vit hava longu nú fingið fleiri fyrispurningar um møguleikan at leiga summarhús í norðaru helvt av oynni. Og tað fegnast vit sjálvandi um, sigur Póla.

Í Suðuroynni eru tvær kunningarstovur. Ein er í Vági og so henda, sum hevur heimstað á Tvøroyri.

### Fleiri ferðandi og bilar

Hagtølini fyri talið av ferðafólkum til Suðuroyar vísa greitt, at fólk veruliga ynskja at vitja hesa sunnastu oyggj okkara.

Áðrenn Smyril kom til landið seinast í oktober mánaði í fjør ferðaðust 10.108 ferðafólk til oynna. Henda mánaðin vórðu fluttir 3.668 bilar.

Í november mánaði, sum var fyrsti mánaðurin við nýggja Smyrli, sást beinanvegin ein stór øking í talinum av ferðafólki og bilum. Íalt vórðu nú flutt 14.398 ferðafólk og 4.940 bilar.

Mánaðin eftir minkað talið av ferðafólki nakað, meðan talið av bilum vaks. Í desember vórðu kortini flutt 13.503 ferðafólk og 5.079 bilar.

Seinastu hagtølini frá Strandferðsluni eru fyri januar mánað í ár: Tá vórðu flutt 12.035 ferðafólk og 4.484 bilar.

### Ynskja gisting

Hesi tølini eru eisini áhugaverd hjá báðum kunningarstovunum í Suðuroynni.

Tey vísa á, at hjá hesum báðum liggur nú eitt stórt arbeiði at fáa øll hesi ferðafólkini væl og virðiliga til oynna fyrstu ferðina, soleðis at tey koma aftur.

– Tey, sum ringja til okkara spyrja fyrst og fremst eftir møguleikunum fyri gisting, og síðani hvat ein kann upplíva í oynni, sigur Póla.

Hesir fyrispurningarnir koma frá øllum landinum, bæði frá einstaklingum, familjum, bindiklubbum og øðrum bólkum av áhugaðum ferðafólkum.

### Vakur siglitúrur

Póla Strøm fegnast tó mest um, at ein vøkstur eisini hevur verið at hóma hesa ársins tíð. Vanliga er ikki so nógv at gera hesa ársins tíð.

– Vit eru tí spent eftir at vita, hvussu hetta fyrsta árið við nýggja Smyrli fer at roynast.

– Alt talar kortini fyri, at hetta verður eitt gott ár, um vit skulu ganga eftir fyrispurningunum og eftirspurninginum eftir summarhúsum, sum vit nú hava fingið, sigur hon.

Hinvegin so vísir Póla eisini á tann vakra siglitúrin um Suðuroyarfjørð. Tað er helst so, sum onkur tók til, at ein sær mun á hvørji ferðafólk eru úr oynni og hvørji eru norðanfjørðs.

Tá Smyril leggur frá landi leggja nógvir suðringarnir seg at sova, meðan onnur verða sitandi og njóta ta vakra útsýnið tey fáa við í prísinum fyri ferðaseðlarnar.

– Jú, fólk elska at sigla henda túrin. Og tað fer væl eisini at gerast so, at tað fer at verða forkunnugt at sigla, nú Norðoyatunnilin letur upp, verður sagt.

Ynskja fólk tí ein vakran túr í einum behagiligum og sjógóðum skipi, so er Smyril ein góð loysn, - ein loysn, sum helst fleiri og fleiri fara at gera brúk av.

SUÐUROYARLEIÐIN

| | 2003 | | 2004 | | 2005 | | 2006 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Ferðafólk** | **Akfør** | **Ferðafólk** | **Akfør** | **Ferðafólk** | **Akfør** | **Ferðafólk** | **Akfør** |
| Jan | 8.430 | 2.382 | 8.891 | 2.993 | 10.317 | 3.363 | 12.035 | 4.484 |
| Feb | 8.653 | 2.338 | 10.497 | 3.379 | 10.212 | 3.384 | | |
| Mar | 11.510 | 3.454 | 11.273 | 4.213 | 12.555 | 4.184 | | |
| Apr | 12.324 | 3.947 | 13.644 | 4.427 | 13.731 | 4.278 | | |
| Mai | 12.221 | 3.274 | 15.295 | 4.901 | 14.636 | 4.771 | | |
| Jun | 16.837 | 4.185 | 12.950 | 4.487 | 18.205 | 5.076 | | |
| Jul | 16.105 | 4.912 | 18.925 | 5.734 | 18.037 | 5.489 | | |
| Aug | 16.042 | 4.861 | 16.983 | 5.250 | 15.926 | 5.118 | | |
| Sep | 12.353 | 4.071 | 13.043 | 4.125 | 12.627 | 4.388 | | |
| Okt | 12.535 | 4.417 | 12.908 | 4.571 | 10.108 | 3.668 | | |
| Nov | 10.815 | 3.856 | 10.015 | 3.772 | 14.398 | 4.940 | | |
| Des | 10.608 | 3.756 | 10.018 | 3.796 | 13.503 | 5.079 | | |
| **Íalt** | **148.433** | **45.453** | **154.442** | **51.648** | **164.255** | **53.738** | | |

**FAKTA**

**Ferðafólk til Suðuroyar**

Yvirlitið vísir talið av ferðafólki og bilum til og úr Suðuroynni seinastu árini. Tølini fyri februar í ár eru ikki klár enn frá Strandferðsluni.